TVØROYRAR KOMMUNA



# **Leiðari** til ungdómshúsið á Tvøroyri

Tvøroyrar kommuna ætlar í næstum at lata upp ungdómshús í pakkhúsi nr. 3 í tí søguliga bygninginum á kaiini á Tvøroyri. Í hesum sambandi verður søkt eftir leiðara til húsið, at byrja 1. mars 2008.

Talan er um eitt starv upp á 30 t./v. Arbeiðstíðirnar verða í høvuðsheitinum seinnapartar og um kvøldið. Húsið verður opið 3 gerandisdagar um vikuna, harafturat má roknast við at tiltøk av og á verða í vikuskiftinum. Afturat leiðaranum verður sett 1 hjálparfólk.

Dagarnar verða býttir sundir soleiðis, at børn frá 4.- 7. flokki verða tann fyrra partin av degnum eftir skúlatíð, og børn/ung frá 8. flokki og upp til 18 ár verða tann seinna partin.

Leiðarin skal í samráð við kommununa og tey ungu sjálv/ur skipa og leggja virksemið í ungdómshúsinum til rættis.

**Leiðarin má tí:**

- Vera nýhugsandi og megna fjølbroyttum avbjóðingum.
- Vera ein eldsál og hava áhuga fyri at arbeiða við børnum og ungum.
- Megna at samskifta við allar aldursbólkar og skipa fyri tiltøkum, ið eru hóskandi fyri øll.
- Kunna arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir.
- Hava hug og áræði at skapa ein tryggan og fjølbroyttan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka.
- Síggja møguleikar heldur enn vansar.
- Hava evni og áræði at ganga nýggjar leiðir.
- Duga væl at samskifta bæði innan- og uttanveggja.
- Hava teldukunnleika á brúkarastøði,
- helst meira.

**Kommunan bjóðar:**

- Eitt áhugavert starv í einum spennandi og søguligum nærumhvørvi.
- Eitt spennandi og fjølbroytt arbeiði við nógvum avbjóðingum.
- Møguleika fyri sjálvstøðugari støðutakan innanfyri avtalaðar karmar.
- Møguleika fyri eftirútbúgving innan leiðslu o.a..
- Løn sambært avtalu við avvarandi yrkisfelag.

Skrivlig umsókn við møguligum prógvum og viðmælum skal sendast til: Tvøroyrar Kommunu Tvørarv. 37, 800 Tvøroyri. Mrk. Leiðari til ungdómshús, og skal verða kommununi í hendi í seinasta lagi hin 8. feb. 2008 kl. 12.00.

Um ivamál eller spurningar eru vinaligast setið tykkum í samband við Susanne Madsen ella Jónleyg B. Petersen á tlf. 371085, ella susanne@tvoroyri.fo, jonleyg@tvoroyri.fo.

# STØRV Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

## Sjúkrarøktarfrøðingur, heilsurøktari/pleygari til psyk. D1

Eitt farloyvisstarv á starvsbrøki 1,0 er leyst at søkja til setan 1. mars til og við 31. desember 2008.

Deildin er ein opin 5 daga psykiatrisk móttøkudeild við 14 seingjaplássum. Arbeiðið er skipað eftir kontaktpersónsskipanini. Vit raðfesta samstarvið, trivnaðin og fakligu menningina høgt. Arbeiðsumhvørvið er avbjóðandi og spennandi.

**Krøv til umsøkjaran:**

- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur, heilsurøktari/pleygari
- fakligan áhuga innan psykiatrisku sjúkrarøktina
- góð samstarvsevni

**Vit kunnu bjóða:**

- góða innleiðslu
- eitt dynamiskt, fjølbroytt og vinarligt arbeiðsumhvørvi
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samstarv

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til deildarleiðaran, Jóngerð M. Nielsen á telefon 304500, lokal 4021, e-post: lsjonni@ls.fo ella leiðandi sjúkrarøktarfrøðingin, Bergit Weihe, lokal 4102, e-post: lsberwe@ls.fo

**Umsóknarfreistin er fríggjadagin 15. februar 2008 kl. 12.00**

## Onnur leys størv á Landssjúkrahúsinum

(sí meira á www.lsh.fo)

**Sjúkraflutningstænastan**
Umsóknarfreistin er 4. februar 2008 kl. 12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingar til B8**
Umsóknarfreistin er 4. februar 2008 kl. 12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingar og heilsurøktarar til B7**
Umsóknarfreistin er 4. februar 2008 kl. 12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingar til B6**
Umsóknarfreistin er 4. februar 2008 kl. 12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingar og heilsurøktarar til E2**
Umsóknarfreistin er 4. februar 2008 kl. 12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingar til A2**
Umsóknarfreistin er 12. februar 2008 kl. 12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingar til G1**
Umsóknarfreistin er 12. februar 2008 kl. 12.00

**Feriuavloysarar fyri bioanalytikarar**
Umsóknarfreistin er 22. februar 2008

Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.
Tað er umsøkjarans ábyrgd at umsóknin er Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti.
Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til:
Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO-100 Tórshavn







**Á Landssjúkrahúsinum**

- er sjúklingurin í miðdeplinum
- eru umleið 200 seingjarpláss
- eru umleið 20 læknafakligar sergreinir
- eru psykiskar og somatiskar seingjardeildir
- eru umleið 800 fólk í starvi í roykfríum umhvørvi
- er virðiligur samverutóni óansæð kyn, húðalit, politiska-, átrúnaðarliga- ella seksuella orientering

Landssjúkrahúsið J.C. Svabosgøta 100 Tórshavn Tel: +298 30 45 00 Fax: +298 31 42 53 lsh@lsh.fo www.lsh.fo

# Tøkk

Strandfaraskip Landsins takkar fyri blómir, vitjanir og góð ynskir í sambandi við, at stovnurin er fluttur í nýggj hølir á Tvøroyri

STRANDFARASKIP LANDSINS

Sosialurin
Sosialurin i